


# Samskipari til fiskiflotan

**Starvsøki umfatar:**
- Ábyrgd og samskipan av øllum manningar- og lønarviðurskiftum umborð á fiskiskipunum hjá reiðarínum
- Dagligt samskifti við manningarumboð og skiparar á fiskiskipunum

**Útbúgving:**
- Fyrimunur er um tú hevur navigatør- ella maskinmeistaraútbúgving, men ikki nøkur fortreyt fyri at søkja

**Royndir:**
- Skal hava royndir við fiskiskipum
- Kunnleiki til ISM/ISP er ein fyrimunur, men ikki ein fortreyt
- Arbeitt við fólki úr øðrum londum
- Arbeitt við logistikki

**Førleikar:**
- Lærunemm/ur
- Góð samskiftis- og samstarvsevnir
- Taka neyðugar avgerðir
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Eyga fyri detaljum
- Dugir at orða teg í talu og skrift á føroyskum og enskum (fyrimunur er eisini at kenna til onnur mál sum spanskt og russiskt)
- Góðan telduførleika

Løn sambart avtalu.

Umsóknarfreistin er 15. oktober 2010

Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum, kunnu sendast við telduposti til justin@thor.fo ella sum vanligt bræv, til:

**Pf. Thor**
Att.: Justin Philbrow
Bryggjan 5
FO-420 Hósvík

Nærri fæst at vita við at ringja til Justin Philbrow, manningarleiðara ella Gunnbjørn Joensen, stjóra, á tel 422 503, ella á heimasíðuni www.thor.fo

FO–420 Hósvík • Faroe Islands • Tel 422 503
Fax 422 383 • thor@thor.fo • www.thor.fo

THOR

*P/F THOR, er eitt felag sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni, og annað virksemi í hesum sambandi, víst verður til heimasíðu okkara www.thor.fo*

# ArtiCon søkir eftir FÍGGJARLEIÐARA

Hevur tú áhuga í bókhaldi, roknskapi og fíggjarstýring, so er tú kanska persónurin, sum vit leita eftir.

Í sambandi við at fíggjarleiðari okkara hevur valt at taka við øðrum avbjóðingum, søkja vit eftir nýggjum fíggjarleiðara.

Talan er um eitt spennandi starv, sum umfatar allar tættir innan bókhalds- og roknskapararbeiði og fíggjarstýring umframt yvirskipað fyrisitingararbeiði. Avbjóðingarnar eru nógvar, og arbeiðsumhvørvið er jaligt og mennandi.

Høvuðsamboðini eru Navision við Invoice Workflow til bókhald, roknskap og fíggjarstýring, meðan LøttLøn verður nýtt til lønarbókhald.

Umsóknir við viðkomandi skjølum skulu sendast til niclas@articon.fo ella á postadressu okkara, sum er P/F ArtiCon, Postboks 3109, 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan „umsókn“.

Eru ivamál ella spurningar, er tú vælkomin at ringja til Niclas Joensen á tel. 216169 ella 350702 í vanligari arbeiðstíð.

ARTICON
**á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn**
**tel. 350700 · fax 350705**

Sosialurin 341800




Verandi stjóri á Brunaumsjón Landsins fer frá vegna aldur, og søkt verður eftir nýggjum stjóra.

Samstundis verða uppgávur stovnsins víðkaðar til eisini at fevna um tilbúgvingarsamskipan og tilbúgvingarumsjón.

***Høvuðsuppgávan er at hava ábyrgd av dagligu leiðsluni á stovninum við serligum atliti at***

- Málum, avrikum og meginsetningum stovnsins
- Samskipan og ráðgeving um tilbúgvingar- og brunamál, herundir at tilevna reglugerðir, kunngerðir og lógir
- Játtanum, fíggjarviðurskiftum og starvsfólkaviðurskiftum
- Málsviðgerð, fyrisiting og avgreiðslu

***Almennu førleikakrøvini eru***

- Útbúgving, ið kann setast í samband við virkisøki stovnsins
- Innlit og royndir innan tilbúgving hjá landi og kommunum
- Innlit í skipanir, reglugerðir og ásetingar, ið viðvíkja brunatrygd
- Leiðsluroyndir ella leiðsluførleikar, umframt royndir, ið knýta seg at virkisøki stovnsins

***Setanartreytir***

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini.

***Umsóknir***

Skrivligar umsóknir við avritum av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast við vanligum brævi til Fiskimálaráðið, stílað til Rógva Reinert, aðalstjóra, Postsmoga 347, 110 Tórshavn ella við teldubrævi til rogvi.reinert@fisk.fo
**Umsóknarfreistin er 25. oktober 2010.**

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rógva Reinert, aðalstjóra, á telefon 35 30 30.

SENDISTOVAN

Fiskimálaráðið

*Brunaumsjón Landsins virkar eftir løgtingslóg um eldsbruna og kunngerðum sambært hesi lóg. Stovnurin fær nýtt navn í næstum: Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins. Á stovninum virka í løtuni trý fólk: stjóri og tveir málsviðgerar. Virkisøki stovnsins fevnir í høvuðsheitum um almenna trygd í samstarvi við allar viðkomandi partar. Stovnurin húsast á Tinghúsvegnum í Havn og er skipaður sum sjálvstøðug bygnaðarlig eind undir Fiskimálaráðnum.*